# Torleif á odda fyri KÍ

**Maðurin, sum í góð 20 ár var ovasti fótbóltsbossurin í Føroyum, skal nú standa á odda fyri KÍ**

KÍ-FORMAÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Eg havi fleiri ferðir fingið hesa áheitan, men eg havi altíð sagt borið meg undan. Satt at siga, so helt eg meg vera pensioneraðan sum ítróttarleiðara. Hesa ferð hava teir tó lovað mær, at eg skal bara vera formaður, og annars einki gera. Fólkini uttan um meg skulu gera alt arbeiðið, og tað helt eg vera góðar treytir at fáa.

Hann dugir framvegis at taka tingini við einum smíli. Torleif Sigurðsson. Gjøngum 30 ár hevur hann havt ymsar sessir í føroyska ítróttarheiminum – harav 20 ár sum FSF-formaður. Men á aðalfundinum hjá KÍ hóskvøldið varð hann fyri fyrstu ferð valdur í nevndina í einum fótbóltsfelag.



*Fyri fyrstu ferð skal Torleif Sigurðsson royna seg sum formaður í føroyskum fótbóltsfelag. Men royndirnar í allar aðrar mátar tykjast vera av slíkum slag, at hann kann verða maðurin, sum samansjóðar felagið eftir stóru umskipanirnar, sum hava verið seinastu tíðina*

### Skal savna kreftirnar

KÍ hevur seinastu tíðina verið gjøgnum umfatandi umskipanir, soleiðis karmar felagsins eru komnir í eina trygga legu. Ein umskipan, sum í nógvar mátar hevur slitið nógv á tey fólkini, sum hava verið partur av nevndararbeiðinum.

Tí er helst meira enn nakran tíð tørvur á einum sterkum miðsavnandi persóni at mynda felagið. Og ivaleyst verður júst savnandi leikluturin tann týdningarmesti av øllum hjá nýggja formanninum. Nakað sum Torleif Sigurðsson heldur ikki avvísur sjálvur.

– Tað man helst vera við atliti til tær royndir, sum eg hóast alt havi, at áheitanin er komin. Nú kenni eg flestu av hinum persónunum í nevndini, og teimum havi eg fult álit á. Men arbeiðið skal eisini samansjóðast, og tí kann eg vónandi verða ein partur av.

### Hava potentialið

Men hvussu sær nýggi formaðurin fyri sær, at KÍ er fyri, nú stóra umskipanararbeiðið tykist vera av?

– Hyggur tú at felagnum, so er eingin ivi um, at talan er um eitt stórt felag. Tí haldi eg, at verða tingini gripin rætt an, so eigur KÍ avgjørt at vera eitt av feløgunum, sum stríðast har, sum tað gongur fyri seg. Tað er kanska ikki nakað, sum vit skapa frá degi til dags, men at møguleikarnir eru at røkka hesum, ivist eg onga løtu í sigur nýggi formaðurin at enda.

Hinir nevndarlimirnir vórðu afturvaldir á aðalfundinum, og nevndin í KÍ er tí mannað soleiðis: Torleif Sigurðsson (formaður), Nichels Lutzen (næstformaður), John William Joensen, ábyrgdarfólk fyri samskifti, Guttorm Sørensen, ábyrgdarfólk fyri fíggjarmál og Kristoffur Ragnarsson, ábyrgdarfólk fyri hondbólt.

# Hannis fekk sekkin

**Venjarin, sum hevur leitt H71 móti avgjørda hondbóltsoddinum, varð í gjárkvøldi sagdur úr starvinum. Jakob Jónsson og Jákup Símun Simonsen hava ábyrgdina av liðnum seinastu dystirnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir góðu avrikini hjá H71 í ár, hava fleiri nevnt Hannis Wardum sum ein av toppkandidatunum til heitið sum ársins venjari, tá hesin skal kjósast á gallaveitsluni eftir kappingina.

Tað kann hann samstundis verða, men tað verður so uttan nakað felag. Hóskvøldið fekk Hannis nevnliga at vita, at hann ikki longur skal venja felagið.

– Seinastu tveir dystirnar er góða støða okkara veruliga komin í vanda. Skulu vit broyta nakað, so má tað henda nú. Og vit vóna sjálvandi, at hetta kann fáa liðið at rakna við, sigur formaðurin í H71, Rúni Djurhuus.

Hann váttar somuleiðis, at tað verða Jakob Jónsson og Jákup Símun Simonsen, sum skulu hava ábyrgdina av liðnum seinastu dystirnar.

### Vónbrotin av nevndini

Tá vit í morgun høvdu orðið á Hannis, segði hann, at hetta sjálvandi var komið dátt við.

– Ikki minst var eg bilsin av, at boðini til mín vóru, at hetta var vegna ónøgd millum spælararnar. Tað er avgjørt ikki nakað, sum eg havi havt fatan av, og eg havi eisini spurt spælararnar um hetta.

– Sjálvandi er tað nevndin, sum tekur avgerðina. Og hava teir valt at siga meg úr starvinum, so má eg taka tað til eftirtektar. Men eg haldi tað vera keðiligt, um teir skulu brúka eina ikkieksisterandi ónøgd millum spælararnar sum umbering fyri hesum, staðfestir Hannis.

Hóast hetta glepsið, so tykist tað kortini, sum er Hannis rímiliga avkláraður við støðuna.

– Tað er so tað, sum kann henda, og sjálvt um tað ikki er nøkur góð kensla, so haldi eg ikki, at eg havi tikið hetta so heilt øgiliga tungt. Men tað er sjálvandi irriterandi, tá tú ikki kanst vera við seinasta partin av vegnum. Eg ivist ikki í, at liðið framvegis hevur góðar møguleikar at røkka finaluni.

Og um so er, at hendan verður móti Kyndli, hvar ætlar Hannis Wardum sær so at sita?

– Tá má eg helst halda meg rímiliga neutralan. Kanska burdi eg bara døma hana, kemur tað skemtandi frá nú fyrrverandi venjaranum.

### Spælararnir ikki orsøkin

Her á blaðnum hava vit eisini verið í samband við spælarar, sum vátta útsagnirnar hjá venjaranum. Altso at talan als ikki hevur verið um ónøgd millum spælararnar.

Hetta skal tó ikki skiljast, sum um spælararnir fara at fremja nakra kollvelting móti nevndini, men teir frábiðja sær ivasama heiðurin, sum tað er, at vera orsøk til uppsøgnina.

Spurningurin er so, hvørt venjaraskiftið fær ynsku effektina. Aðra staðir hevur tað við hvørt givið góð úrslit, tá slík skifti eru framd. Og við trimum dystum eftir, er einki at ivast í, at skal stigið takast, so má hetta verða her og nú. Tað er so effektin, sum nevndin sigur seg leita eftir. Fyrsti parturin av svarinum fæst helst sunnudagin.

### Framvegis skaðar hjá Start

Venjarin hjá Toda Jónsson og hinum spælarunum í Start ynskti sær ein skaðafrían spælarahóp í føðingardagsgávu. Men tað fekk hann ikki.

Tom Nordlie kann halda sín 44 ára føðingardag í dag, men fimm av hansara spælarum eru framvegis skaddir. Herfyri varð støðan munandi verri, tí tá var næstan eitt hálvt lið ikki ført fyri at spæla. Nú eru fleiri av t ðandi spælarunum komnir fyri seg aftur, so tað ljósari út hjá Nordlie og hansara liði.

Todi Jónsson var ein av spælarunum, sum hevði skaða at dragast við, men hann er komin fyri seg aftur og hevur spælt við í seinastu dystunum hjá Start.

### Íslendingar vilja hava Parkina

Nevndarformaðurin í Parken Sport & Entertainment, Flemming Østergaard, hevur seinastu tíðina roynt at hildið íslendingum burtur frá at keypa seg inn í felagið, sum eigur og rekur danska tjóðarleikvøllin. Børsen skrivar, at í minsta lagi eitt íslendskt felag hevur viljað keypt partabrøv í Parkini, men at Flemming Østergaard ikki vil hava íslendingar uppí. Ístaðin var tað danski vinnulívsmaðurin Steen Larsen, sum í fjør keypt partabrøv í felagnum.

### Frem góðar vónir

Tað hevur verið stór útskifting í spælarahópinum hjá danska 1. deildarliðnum Frem í vetur. Ein av spælarunum, sum er farin úr felagnum, er føroyski landsliðsspælarin Jón Rói Jacobsen. Hinvegin eru tríggir aðrir føroyskir spælarar í felagnum – Gunnar Nielsen, Jónas Tór Næss og Atli Gregersen.

Andreas Broch, sum er nevndarlimur í Frem, hevur góðar vónar til seinnu hálvu av kappingini, sum byrjar í næstum.

– Vit hava ein góðan hóp, sum eg vænti mær nógv av. Tað er spennandi við so nógvum ungum spælarum, men vit hava tó eisini rutineraðar spælarar, sum kunnu hjálpa teimum ungu, sigur hann við heimasíðuna hjá Frem.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir



Lesið Sosialin
-tað loysir seg